

253 metrar langa West Navion lá í Nólsoyarfirði leygardagin

# West Navion er nakað fyri seg

**Leygardagin høvdu umboð fyri fjølmiðlarnar og onnur møguleikan at vitja umborð á West Navion. Arbeiðið hjá West Navion fer í fyrstu atløgu at taka átta vikur, og framkomna boriskipið hevur allar hentleikar, sum skulu til**



*Á myndini sæst framkomni trygdarventilurin, sum verður brúktur undir boring*

BORISKIP

*Heri á Rógvi*
*Myndir: Bárður Johansen*

Tað var leygardagin í síðstu viku, at stóri riggurin/ boriskipið West Navion sást liggja í Nólsoyarfirði. Tað var eisini henda sama leygardag at umboð fyri fjølmiðlarnar, embætisfólk og landsstýrismenn fingu høvið at vitja skipið.

Tað vóru fleiri enn tjúgu fólk, sum møttu upp á leygardagin. Áðrenn ferðalagið fór umborð, so var ein sokallað briefing, har fólk vórðu kunnaði um trygdina og onnur viðurskifti umborð. Tann kanska mest spennandi parturin við briefingini, og møguliga eisini túrunum sum heild, var tá hvør í ferðalagnum fekk eina tasku frá vertunum, har ketildrakt, hjálmur, skógvar og annað vóru í. Navnið á einum stóð broderað á draktina, og hetta tóktist sum óførur fongur hjá teimum uppmøttu. Ikki nokk við tí, men tú slap eisini at eiga klæðini eftir at vitjanin var liðug.

Tað, at vertirnir tóku sær væl av gestunum, var eisini nakað, sum eyðkendi túrin. Trygdina skuldi eingin ivast í, og fyrilit av øllum sløgum vóru eisini tikin fyri, at vitjanin umborð á West Navion skuldi gerast so góð sum gjørligt og uttan skaðar.

Lat tað vera sagt beinanvegin, at vitjanin var eitt óført og forkunnugt upplivilsi, sum undirritaði væntandi ikki kemur at uppliva so ofta. Leiðarnir tóku sær væl av okkum. Tá hugsað verður um, at skipið kostar 2,5 mill. kr. um dagin at leiga, so er einki at siga til, at skundað var undir tey vitjandi eitt sindur.

## Upplivilsi

Ferðalagið leygardagin taldi eisini embætisfólk, sum uttan iva hava roynt okkurt líknandi, men fyri tey flestu í ferðalagnum var hetta ein forkunnugur møguleiki at síggja í verki, hvussu eitt tílíkt skip sær út og virkar. Skipið lá í Nólsoyarfirði, so einki borivirksemi var, men hetta gav samstundis betri møguleikar hjá okkum at hyggja okkum í kring.

Tað kunnu vera upp til 117 búgvandi fólk umborð á skipinum. Hesi hava eisini góð kor. Mat fáa tey nógvan og góðan, tí køkurin umborð er væl mannaður og hevur hópin av freistingum at bjóða uppá.

Skipið er risastórt og tað kendist stundum sum um, at tú vart leiddur ígjøgnum tann loyndarfulla býin, tá ein var umborð. Teir 254 metrarnir, sum skipið er til longdar, fara einamest til boriútbúnað, tí hetta krevur eitt sindur av plássi. Manningin hevur tó eisni fleiri rúm umborð, og fleiri arbeiðsrúm eru eisini umborð. Uppí á brúnni sita hópin av fólki, sum skulu halda skil á boring, plasering og dagligu leiðsluni umborð á skipinum. Skiparin umborð, Evy Heyjedal, er kvinna, og hennara uppgávuna er at standa fyri dagligu umsitingarligu leiðsluni umborð.

Tað var kanska eitt sindur avmarkað, hvat ferðalagið leygdardagin fekk høvið at síggja, men tað var ikki minni spennandi av teirri orsøk. Víst var runt í maskinrúmunum, á brúnni og uttanfyri, har hjarta á boringini kann sigast at vera. Lat tað eisini vera sagt, at skipið í allar mátar tóktist sum eitt frálíkt far, sum samstundis tóktist at vera nýtíðar hóskandi.

## 2,5 mill. um dagin

Túrurin leygardagin vardi heldur ikki serliga leingi, og BP, ið hevði boðið fjølmiðlunum saman við Smedvig, vildi ikki hava at nakað óhapp av nøkrum slag skuldi koma fyri. Túrurin skuldi ganga so skjótt sum gjørligt, og gestirnir vórðu allir væl ílætnir av fyritøkunum. Tað er eyðsæð, at fyritøkurnar royna at gera eina so góða mynd av sær sjálvum sum gjørligt, og hetta má eisini sigast at hava hepnast væl hjá teimum.

Skipið er heldur ikki bíligt hjá BP at nýta. Sambært Lynne Staples-Scott, sum starvast innan marknaðarføring hjá BP, so er kostnaðurin 2,5 mill. um dagin fyri West Navion. Tí hevur tað verið ein heldur dýrur umgangur hjá fyritøkuni, tá West Navion hevur ligið í Nólsoyarfirði, men tá skipið skal fáa tær neyðugu góðkenningarnar, so er einki annað í at velja. At skipið soleiðis lá í Nólsoyarfirði gav eisini ferðalagnum leygardagin ein forkunnugan møguleika, sum ikki var galin kortini.

Spurningurin er so bara, hvussu úrslitini vera um átta vikur.



# Framkomið skip

**West Navion er eitt sera framkomið skip. So at siga alt umborð verður stýrt av teldum, og skipið hevur tvey boritorn. Hesar fyrstu boringar vilja m.a. siga, hvussu arbeiðið skal gerast í sambandi við møguligar framleiðsluboringar, sigur Tor Oftedal, borileiðari á West Navion**

BORISKIP

*Heri á Rógvi/ Bárður Johansen*

Tey flestu, sum hava hoyrt, lisið um ella sæð boriskipið, West Navion, vita, at talan er um eitt ógvuliga stórt skip. Longdin á skipinum er 253 m., meðan breiddin telur 42 og hæddin telur 90 metrar. Hetta eru ikki støddir, ið vit her á leigum eru so von við. Stand-by skipið, Faroe Connector, minti um ein útróðrarbát, tá tað lá við síðuna á West Navion. Sum heild er talan um eitt rættiliga stórt og framkomið skip. Skipið hevur allar tær nútímans hentleikar, sum eitt tílíkt skip kann hugsast at hava, og tað eru heldur ikki fleiri enn seks sovorðin skip í heiminum. Tað er Smedvig, sum hava sæti í Stavanger, ið eiga West Navion. Fyritøkan hevur 3000 starvsfólk, og hava umboð fyri fyritøkuna verið í Føroyum áður m.a. í sambandi við vinar- og vinnubýarsamstarv millum Stavanger og Tórshavn.

Skipið er somikið framkomið, at tað uttan víðari kann taka sær av bæði royndarboringum og framleiðsluboringum. Skipið hevur tangar, sum kunnu goyma heilt upp til 100.000 føt av olju. Eisini kann skipið gera fleiri sløg av boringum, men til hesar fyrstu royndarboringarnar verður vanligur lodrættur boriháttur nýttur.

Tað vera hesar boringarnar, sum fara at avgera, hvussu arbeiðsleisturin fer at vera í framtíðini. Hesar boringarnar vera avgerandi fyri hvønn arbeiðsháttt valt verður í sambandi við møguligar framleiðslu boringar. Spurningurin er ikki einans um olja er til staðar, men so sanniliga eisini hvussu og um tað ber til at fáa oljuna upp úr undirgrundini.

Tann spurningurin, sum flest fólk vilja hava svaraðan í sambandi við West Navion, er óivað, hvussu skipið kann halda sær flótandi í einari fastari legu, soleiðis at tað ber til at bora. Frágreiðingin til hetta er, at skipið hevur sjey propellir, sum móttaka upplýsingar frá GPS fylgissveinaskipanini. Upplýsingarnir, ið propellirnar ella skipið móttekur, verða síðani nýttir til at siga propellinum, hvussu nógva orku tær skulu nýta. Hetta hevur so við sær, at skipið so at siga heldur eina fasta legu. Eigarnir av skipinum siga, at skipið flytur seg í mesta lagi ein metur, og bert ein brotpartur av samlaðu orkunu hjá propellunum varð nýttur, tá skipið leygardagin lá í Nólsoyarfirði. Skiparin umborð, Evy Heyjedal, sigur, at tað verður væntandi eingin trupulleiki at halda eina fasta legu, tá skipið fer undir royndarboringarnar.

Sum áður nevnt, so hevur West Navion tvinni boritorn. Hetta er heldur ikki heilt vanligt. Sambært Tor Oftedal, borileiðara, so er hetta ein stórur fyrimunur, og ger hetta samstundis at boringin verður meiri effektiv.

Tekniskt er skipið rættiliga framkomið, og tey tekniskt áhugaðu leygardagin fingu eisini eitt spennandi upplivilsi. Alt á skipinum er nýmótans, og samstundis leggja teir seg eftir at fara væl við umhvørvinum, tí hetta krevja nútímans reglugerðir. Skipið nýtir einans vatnbaseraða borimóru. Bórimóran verður nýtt til m.a. at syrgja fyri, at sjálvur boristrongurin ikki gerst ovurhitaður. Vatnbaserað borimóra hevur tann fyrimunin at hon dálkar minni enn eitt nú oljubaserað borimóra, men oljubaserað borimóra hevur gott orð á sær, tá ið tað snýr seg um at vera effektivt.

Tað verður í øki 04, at West Navion fer at bora. Hetta økið verður roypt “Svínoy leitimiðið”, og er hetta økið tað norðasta í tí sokallaða gullhorninum, sum liggur í ein landssynning úr Føroyum. Eisini Sovereign Explorer borar um hesar leiðir, og liggur hann nakað vestanfyri West Navion. Tað eru Faroese Partnership og Agip, sum eiga hinar báðar partarnar av gylta horninum við Hetlandsrennuna.

*West Navion nýtir sera framkomna tøkni*



Elttør og Kallsberg:

# – Hetta er líka spennandi sum Sovereign Explorer

**Løgmaður og oljumálaráðharrin eru samdur um, at hetta var eitt minst líka spennandi upplivilsi sum vitjanin á Sovereign Explorer. Báðir vóru á einum máli um, at hetta er eitt spennandi og framkomið skip**

BORISKIP

*Heri á Rógvi/Bárður Johansen*

Millum gestirnar umborð á West Navion leygardagin vóru umboð úr landsstýrinum. Eyðun Elttør, landsstýrismaður í olju- og umhvørvismálum, Jørgen Niclasen, landsstýrismaður í fiskivinnumálum og Annfinn Kallsberg, løgmaður. Eyðun Elttør og Annfinn Kallsberg vóru báðir við á Sovereign Explorer, tá fólk vitjaðu har fyri sløkum tveimum vikum síðani.

Teir báðir vóru eisini á einum máli um, at hetta var eitt spennandi upplivilsi. Tað báðir eru eisini samdir um, at munur er á hesum skipinum og Sovereign Explorer. Hesir báðir fingu eisini serliga nógv uppmerksemi umborð á skipinum.



## Elttør

Eyðun Elttør er fyrsti og higartil einasti oljumálaráðharrin í Føroyum. Hann er samstundis eisini útbúgvin maskinmeistari.

- Hetta var eitt upplilsi at fáa møguleikan at vitja hetta skipið. Tað er eitt stórt upplivilsi fyri meg bæði sum landsstýrismann og sum maskinmeistara, tí hetta skipið var tekniskt ógvuliga framkomið, samstundis sum hetta er nakað nýtt innan føroyska oljuvinna. Man kann siga, at eg var bæði við sum maskinmeistari og sum landsstýrismaður, sigur Eyðun Elttør.

Spurdur um hann helt, at oljumálastýrið hevur gjørt tað, sum teir kunna, nú ein oljuvinna so at siga er byrjað í Føroyum, segði Eyðun Elttør, at hann metti at oljumálastýrið hevur gjørt tað, ið tað hevur verið ført fyri.

- Vit hava ikki havt nógv fólk í oljumálastýrinum, so vit hava verið noyddir til at leita eftir hjálp uttani frá, men oljuvinnan er eisini so stór og umfatandi, at hetta má metast at vera neyðugt. Kjarnin í før-oysku oljuvinnuni liggur tó í oljumálastýrinum, sigur Eyðun Elttør.

- Oljuvinnan er so risastór, at vit mugu venda nøsina úteftir fyri at fáa kunnleikan, men tað hevur alstóran týdning, at tað eru vit í Føroyum, ið áseta krøvini, sigur Eyðun Elttør.

Eyðun Elttør verður væntandi fyrsti føroyingurin, ið fær at vita, um nakað áhugavert goymir seg í føroysku undirgrundi, men hann hevur ikki gjørt sær so nógvar tankar um, hvussu gerast skal eftir hetta, tí tað er trupult at gera metingar um júst hetta.

- Vit mugu eisini ansa eftir, at vit ikki lata okkum imponera ov nógv, sigur Eyðun Elttør um tey mongu rósandi orðini, sum BP hevði at bera oljumálastýrinum.

## Kallsberg

Annfinn Kallsberg var samdur við Eyðuni Elttør, at hetta hevði verið eitt spennadi upplivilsi. Hann sigur tó, at tað var heldur øðrvísi at vera umborð á West Navion og at vera umborð á Sovereign Explorer. Fyrst og fremst tann sjónligi munurin, at talan var um eitt tvey ymisk sløg av riggum, men eisini tí at Sovereign Explorer var á leiðini, har hann skuldi bora.

Annfinn Kallsberg hevði eisini góð orð at bera tí tøkniliga partinum, og hann var skilliga nøgdur.

Ein av spurningunum, sum rættast er at venda móti Annfinni Kallsberg, er um framtíðar ætlanir viðvíkjandi framleiðslu innan føroysku oljuvinnuna.

- Tað eru sjálvandi tankar og fyrireikingar, sum eru gjørdar fyri nógvum árum síðani, og tað liggur eisini í oljulóggávuni, at so nógv sum gjørligt av aktivitetum skulu fremjast frá Føroyum av. Persónliga meti eg, at tað eru nógv positiv ting, sum kunnu fáast burturúr oljuni, og ein loysn kundi verið avgjøld, ið kunnu koma í staðin fyri tað, at alt skal um føroyskan bryggjukant, sigur Annfinn Kallsberg.

Løgmaður vil ikki út við hvørjar ætlanir og tankar landsstýrið hevur gjørt sær um framtíðar viðurskifti innan framleiðslu í føroysku oljuvinnuni.